Fimm ung í ferðsluóhappi:

# Trygdarbeltið bjargaði lívinum

**Fríggjakvøldið í síðstu viku vóru fimm ungdómar í einum ferðsluóhappi á Oyggjarvegnum. Høvdu tey ikki verið í trygdarbelti, høvdu tey ikki komið so mikið væl frá óhappinum**

FERÐSLUÓHAPP
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Tað er einki at ivast í, at trygdarbeltini eiga lívið í teimum ungu í bilinum. Dóttur mín hevði bara trygdarbeltið um búkin, og tískil hevur hon brotið ryggin. Hini í bilinum hava tíbetur einki brotið, men hava ilt í rygginum, knøunum og halabeininum. Men hvat hevði hent, um tey ikki vóru íbundin, tori eg næstan ikki at hugsa um, sigur Annika í Dali, mamma at 13 ára gomlu Bryndis í Dali, sum sat mitt aftanfyri í bilunum.

Fríggjakvøldið klokkan hálvgum átta fóru fimm ungdómar biltúr til Kollafjarðar. Tey keddu seg í Havn, tí flest øll hini vinfólkini vóru á G! festivali í Gøtu.

Tey koyrdu eftir Oyggjarvegnum, tí tey hildu Kollafjarðartunnilin var stongdur vegna vegarbeiði. Á Oyggjarvegnum var ógvuliga tjúkt í mjørka, og tí koyrdi 21 ára gamli bilførarin við varsemi, og øll í bilinum spentu trygdarbeltið um miðjuna.

Tá tey komu niðan á fjallið og skuldu venda oman móti Statoilstøðini í Kollafjarðardali, steðgaði bilførarin fyri einum seyði á vegnum. Bilførarin, sum koyrdi aftanfyri, sá ikki, at bilurin frammanfyri steðgaði, og rendi við fullari ferð inn í bilin hjá ungdómunum. So fór bilurin við nógvari ferð inn í bilverjuna og síðani fleiri metrar niðanav:

– Hevði bilurin flutt seg minni enn hálvan metur afturat, hevði hann dottið niður í eina djúpa holu, sigur Árna Helmsdal, mamma at 13 ára gomlu Bjartu Helmsdal, sum sat aftanfyri í bilinum.

Einki hendi við bilinum ella bilføraranum, sum rendi á, men ungdómarnir í árenda bilinum vóru flutt við sjúkrabili á Landssjúkrahúsið í skundi. Serliga var tann eina gentan, sum sat mitt aftanfyri í bilinum, illa fyri:

–Vit fingu bara smáar bitar av søguni at vita í senn. So at byrja við helt eg bara, at eg skuldi út á skaðastovuna eftir dóttrini. Men tá eg so kom út á Landssjúkrahúsið, sá eg, at verri var statt, sigur Annika í Dali.

– Í gjár fingu vit síðan at vita, at hon hevði fingið heilaskjálvta, brotið ryggin og noyðist at liggja í korsett í tríggjar mánaðir. Enn vita vit ikki, hvørja ávirkan hetta fer at hava á hana, men tíbetur hava vit fingið at vita, at hon ikki verður lamin, sigur Annika í Dali at enda.



*Bilurin hjá ungdómunum gjørdist vrak, tá hann við fullari ferð fór niðan av vegnum. Ungdómarnir, sum eru 13, 16 og 21 ára gamlir, vórðu við skundi fluttir á Landssjúkrahúsið til kanningar*

# Spentu trygdarbeltið tveir minuttir áðrenn óhappið

**- Eg sá bilin aftanfyri koma nærri og nærri. Eg varð sera bangin, og at enda blundaði eg bara, greiðir Bjarta Helmsdal frá, sum saman við hinum í bilinum spenti trygdarbeltið tveir minuttir áðrenn óhappið**

FERÐSLUÓHAPP
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Vit plaga als ikki altíð at sita íbundin, og eg havi altíð bara hildið, at trygdarbeltið er nakað fjas. Og bert tveir minuttir áðrenn vit vórðu árend, segði eg til stuttleika við bilføraran. 'Tú koyrir so skjótt, at vit noyðast øll at spenna okkum í trygdarbeltið'. Tað er løgi, men tá spentu vit øll trygdarbeltið, sigur 13 ára gamla Bjarta Helmsdal, sum sat aftanfyri í bilinum, tá óhappið hendi.

Bjarta og hini, sum vóru í bilinum, eru sjálvandi framvegis skelkað av hendingini. Men tey hava tó valt at greiða frá tilburðinum, fyri at onnur ung møguliga somuleiðis kunnu læra av honum:

– Eg sá bilin aftanfyri koma nærri og nærri. Eg varð sera bangin, og at enda blundaði eg bara. Eftir hetta minnist eg einki, fyrr enn vit koyrdu við fullari ferð við einum ýlandi sjúkrabili, greiðir Bjarta frá.

– Á sjúkrahúsinum vórðu vit øll koyrd inn á hvør sína stovu. Allir læknarnir, sum vóru á vakt, vórðu boðsendir. Eg sat á einari song, var ísakøld og púra í sjokk. Eg skuldi taka blóðroyndir og annað, men tað einasta, eg vildi, var at sleppa út til hini fyri at vita, hvussu tey høvdu tað, sigur hon og leggur afturat, at øll enn eru skelkað av hendingini:

– Vit hava øll mist matarlystin. Í gjár vóru vit á Oyggjarvegnum og sóu staðið, vit koyrdu niðanav. Tað var ótespiligt at síggja, og eg var alla tíð bangin fyri, at pápi mín skuldi koyra ov skjótt, hóast hann koyrdi spakuliga, sigur hon og leggur dent á, at tey hava verið ótrúliga heppin:

– Vit hava veruliga lært av hesari hending. Eg fari í øllum førum ongantíð aftur at koyra uttan at spenna trygdarbeltið. Og tað áttu øll at gjørt, sigur Bjarta at enda.

> *Allir læknarnir, sum vóru á vakt, vórðu boðsendir. Eg sat á einari song, var ísakøld og púra í sjokk. Tað einasta, eg vildi, var at sleppa út til hini fyri at vita, hvussu tey høvdu tað*
>
> *- 13 ára gamla Bjarta Helmsdal*

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

- Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*